# Nóa ørk

*Ein søga um hvussu Gud reinsaði heimin*

Hesin teksturin hóskar væl at siga ella lesa fyri næmingunum. Lærarin eigur at hava lisið tekstin frammanundan, so hann kann liva seg inn í søguna. Gott er, um nýggj og torfør orð ella máliskur verða gjøgnumgingnar í flokkinum, áðrenn teksturin verður lisin upp ella endursagdur.

Teksturin er ætlaður at skapa eina djúpa hugsavnan og innliving í søguna. Hetta kann lærarin kanska gera við at sløkkja ljósið, tendra eitt kertuljós og møguliga biðja óstillar næmingar blunda og savna seg um at lurta.

Í námsætlanini fyri kristnikunnleika og átrúnað er krav, at eftir 2. flokk skulu næmingarnir *duga at lurta eftir frásøgnum og søgum*. Hetta skal venjast. Best er, um spurningar, prát og annað virksemi bíðar, til lærarin er liðugur at lesa ella siga frá.

Niðast á hesi síðuni eru uppskot til hugvekjandi samrøðu. Ikki er neyðugt at taka allar spurningarnar við í viðgerðina.

*Anne Schjelderup hevur endurgivið søguna úr Gamla Testamenti við egnum orðum og tulkingum. Hetta er sostatt ikki beinleiðis frásøgn úr Bíbliuni.*

# Nóa og ørkin

Hava tit hoyrt um tey fyrstu menniskjuni á jørðini, Ádam og Evu? Tey fingu tveir synir, sum itu Káin og Ábel. Káin var so øvundsjúkur á beiggja sín, at hann drap hann. Eftir hendingina angraði Káin og rýmdi heimanífrá.

Eftir hesa ræðuligu hendingina fingu Ádam og Eva ein annan son, sum tey nevndu Set. Hann gjørdist ættarfaðir Nóa, sum bjargaði mannaættini frá at verða løgd í oyði. Hesa søguna fara vit at hoyra nú. Hetta er søgan um Nóa og ørkina.

Tá Nóa livdi, vóru fólk eins øvundsjúk, sjálvglað og sjúk eftir verðini sum í dag. Og tit mugu ikki halda, at tað bleiv frægari, eftir at Káin hevði dripið beiggja sín. Tvørturímóti! Tað gjørdist bara verri og verri.

Heldur enn at gera sum Ábel og vera hjartagóð og vilja øðrum tað besta, gjørdu tey sum Káin. Tey gjørdu bæði eitt og annað, fyri at onnur skuldu geva teimum gætur. Og oftani vóru tey ljót hvør móti øðrum. Tey løgdu einki í, hvussu onnur høvdu tað. Nei, tað einasta, tey hugsaðu um, var, at tey sjálvi skuldu hava tað gott. Tey lugu, stjólu og vóru ljót móti hvørjum øðrum fyri at fáa sín vilja.

Tí angraði Gud, at hann hevði skapt menniskjuni. Ein dagin gjørdi hann av, at øll menniskju skuldu oyðast. Hann ætlaði at lata regn koma yvir jørðina. Regn, regn og aftur regn. So nógv, at allur heimurin varð undir í vatni. Um øll druknaðu, so var eingin at gera ónáðir og vera óndur longur.

Men ein trupulleiki var við hesum. Nógv dýr vóru á jørðini, og tey vóru als ikki ónd. Eisini vóru nøkur heilt fá menniskju á jørðini, sum høvdu eitt reint hjarta. Menniskju sum elskaðu Gud og vóru góð við sínar næstar. Hesi vóru Nóa, kona hansara, synir teirra og konurnar hjá teimum. Hesi fólkini gjørdu ongum mein. Tey kundi Gud ikki oyða.

Gud gjørdi av, at tosa við Nóa. Hann bað hann byggja eina risastóra ørk við einum risastórum taki. Ørkin skuldi vera tríhundrað alin long, hálvtrýss alin breið og trettan alin høg. Rúm skuldi vera fyri øllum dýrasløgum í heiminum. Tvey av hvørjum! Eisini skuldi rúm vera fyri einari rúgvu av mati, so ørkin var av sonnum veldiga stór.

Øll, sum sóu, hvat Nóa var í gongd við, flentu at honum og søgdu, at hann var vorðin í ørviti. Allastaðni har hann var, spottaðu tey hann og hildu hann fyri gjøldur. Tað var ikki lætt at vera

Nóa, men hann visti bara, at hann mátti gera sum Gud hevði sagt. Hann bygdi sum fyri lívinum og góðtók, at Gud vildi hava hann at gera hetta.

At enda varð Nóa liðugur við ørkina. Gud segði tá við hann, at hann skuldi fáa øll dýrini, matin og familjuna umborð sum skjótast, tí um sjey dagar fór at regna. Nóa gjørdi, sum Gud hevði biðið hann, og síðan kom regnið!

Tað regnaði av grimd, og eingin glotti sást á himlinum. Soleiðis helt tað á í nógvar dagar. At enda megnaði jørðin ikki at súgva vatnið til sín, so nú fór at fløða. Fólk flýddu upp í fjøllini, men ikki vildi halda uppat at regna. Skjótt fløddi allur heimurin, og øll druknaðu. Øll uttan tey, sum vóru umborð á ørkini.

So langt eygað rakk var vatn. Ikki ein fjallatindur var at hóma. Bara vatn, vatn og vatn. Í hundrað og  hálvtrýss dagar fleyt ørkin á vatninum. Tá gjørdi Gud av at steðga regninum. Hann sendi hvassan vind at taka vatnið burtur, og at enda kundu tey hóma fjallatindar stinga upp úr vatninum. Ørkin rendi á fjallið Árarat, og har var hon standandi.

Ikki bar til at búleikast á Árarat, so fjøruti dagar seinni sendi Nóa eina dúgvu út gjøgnum eina lúku í ørkini. Dúgvan fleyg langa leið, men kom síðan aftur. Hon hevði ikki funnið land, sum hon kundi setast á. Nóa bíðaði tí sjey dagar afturat og sendi síðan dúgvuna út aftur. Um kvøldið kom dúgvan aftur við einum frískum blaði av einum oljuberjatræi. Tá skilti Nóa, at hon hevði funnið gróðrargott land. Hann bíðaði aftur sjey dagar, og so slepti hann dúgvuni út aftur. Hesa ferð kom dúgvan ikki aftur.

Um somu tíð segði Gud við Nóa: “Far út úr ørkini og tak konu tína, synir tínar og sonarkonur tínar við tær. Tak við tær øll dýrini, sum eru í ørkini, alt tað, sum livir, bæði fugl og fæ og øll skordýrini.

Nóa bygdi eitt altar og ofraði til Gud. Tá gjørdi Gud av, at hann ongantíð aftur skuldi týna alt lív av jørðini. Menniskjað var, sum tað var, við sínum evnum at fremja bæði góðar og ringar gerðir. Hann lovaði, at hetta aldrin skuldi henda aftur. Tí gjørdi hann ein sáttmála við Nóa og synir hansara og allar eftirkomarar teirra. Alla jørðina gav hann teimum, og hann lovaði, at hann ongantíð aftur skuldi lata vatnið drepa alt lívið á jørðini.

Gud segði: “Hetta verður tekini um sáttmálan, sum eg geri millum meg og tykkum og allar livandi verur, sum eru hjá tykkum, og til øll komandi ættarlið. Eg seti mín boga í skýggini, og hann skal vera eitt tekin um sáttmálan millum meg og jørðina. Tá eg savni saman skýggini á

himmalinum, og bogin kemur til sjóndar millum skýggini, tá skal eg altíð minnast sáttmálan, sum eg gjørdi millum meg og tykkum og allar livandi verur. Ongantíð aftur skal vatnið gerast til eina flóð, sum oyðileggur alt lív.

Bogin var tekini um sáttmálan millum Gud og alt, sum livir á jørðini. Hevur nakar av tykkum sæð henda bogan?

# Uppskot til hugvekjandi samrøðu

1. Gud segði, at hann ongantíð aftur skuldi lata eina slíka vatnflóð oyða jørðina. Merkir hetta, at Gud angraði tað, hann hevði gjørt? Men er tað ikki soleiðis, at Gud kann síggja alt, sum hendir, bæði í fortíðini og í framtíðini? Hvussu kann ein, sum veit, hvat fer at henda í framtíðini, gera okkurt, sum hann fer at angra seinni? Um tú visti, at tú fórt at angra okkurt, sum tú hevði ætlað tær at gjørt, hevði tú so gjørt tað?

2. Gud roynir at reinsa jørðina frá øllum óndskapi. Hann roynir at týna øll menniskju, sum eiga nakað ónt innan í sær. Gud vil, at verðin skal blíva eitt vakurt og rættvíst stað. Hevur tú nakrantíð havt hug til at oyðileggja alt tað, tú vart í gongd við, so tú kundi byrjað umaftur? Til dømis, um tú legði eitt putlispæl? Kunnu vit onkuntíð byrja heilt av nýggjum, ella eiga vit altíð at enda tað, sum vit hava byrjað?

3. Nóa mátti gera tað, sum Gud hevði biðið hann, hóast øll onnur hildu, at hann var í ørviti. Men hvussu kundi Nóa vita, hvat Gud hevði sagt? Var Gud kanska ein rødd innan í honum, ella heldur tú, at Nóa kundi síggja Gud í veruleikanum? Hevur tú nakrantíð hoyrt røddir innan í tær? Hevur tú nakrantíð hoyrt Guds rødd? Hevur tú nakrantíð sæð Gud? Er tað gjørligt at síggja Gud?

4. Hvussu kundi hvassur vindur beina alt vatnið burtur? Hugsið um, hvat hendir á havinum, tá ið tað er nógvur vindur. Hvørvir vatnið av vindinum? Um vit hugsa okkum, at vindurin brádliga vaks og gjørdist dupult so harður sum ein ræðulig ódn, hevði havið tá horvið? Hvar bleiv alt vatnið av, sum Gud tók burtur við vindinum? Kanska át vindurin vatnið?

5. Gud viðurkendi, at menniskjað var, sum tað var, altso, at tað var bæði gott og ónt. Tí gjørdi hann av, at hann vildi ikki royna at broyta menniskjað eina ferð afturat. Men í tí liggur nakað løgið, tí um øll menniskju eru eftirkomarar hjá Nóa og hansara familju, sum Gud helt vera blíð og skilagóð menniskju, hví finnast ónd menniskju so í dag? Eru menniskjuni blivin ónd aftur av sær sjálvum, ella átti Nóa og hansara familja okkurt ónt innan í sær hóast alt?